# Lítli Petur Alberg varð jarðaðu

**Frásøgnin úr gamla kirkjugarði á Svínaryggi kemur hesa ferð at snúgva seg um triggjar gravir. Hesar eru so samanbundnar, at tær mugu viðgerðast undir einum. Her er talan um Betti og Djóna í Geil, synir hansara Petur Alberg og Kristin í Geil og konur teirra Jóhanna og Nicolina. Síðan er tað sonur Petur Alberg, sum varð kallaður lítli Petur. Hann er tann, sum fyrst verður umrøddur**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo



*DIONE ISAKSEN R. AV D*
*F. 12 SEPT 1849*
*D. 20 APRÍL 1912*

*HANN VAR EIN TEIRRA IÐ STOVNAÐU HAVNAR AVHALDSFELAG SUM HANN Í MONG ÁR VAR FORMAÐUR FYRI OG HEIÐURSLIMUR Í.*
*TIL DEYÐADAGS VAR HANN ODDMAÐUR Í ØLLUM ARBEIÐI FYRI AVHALDSSAKINI TIL FRAMA.*

*HENDA STEIN SETTU KVINNUAVHALDSFELAGIÐ OG HAVNAR AVHALDSFELAG HONUM TIL MINNIS UM HANSARA TRÚGVA STARV.*

## Lítli Petur

Á grøvini hjá Djóna í Geil er ein sera vakur gravsteinur, sum er settur av avhaldsfelagnum og kvinnuavhaldsfelagnum i Havn. Steinurin er settur stutt eftir, at Djóni doyði, men hann er pussaður upp fyri kortum og sær út sum nýggjur. Í hesi grøvini liggur eisini Betti, kona Djóna. Men afturat hesum er Petur, sonur Petur Alberg, grivin í somu grøv. Betti og lítli Petur standa ikki á gravsteininum, men tað skilst, at ættin hevur í hyggju at seta eina plátu á grøvina við teirra nøvnum.

Frásøgnin um lítla Petur er grundað á tað, sum pápin, Petur Alberg, hevur skrivað í síni dagbók, og á frásøgnina, sum Petur Háberg, f. 1914-1984, hevði frá jarðarferðini í Hugbirtingum.



*Lítla Petur var nú sera fittur. Hann gjørdist bert fýra ára gamal*

Sum okkara lesarar hava varnast, var Petur Alberg óførur at skriva dagbók, sum nógv hava lisið við áhuga. Hesi kunnu gleða seg til at frætta meira frá hesum megnarmanni seinni í ár.

Petur skrivaði umframt um nógv annað eisini um sína familju og um Lítla Petur. Hetta fara vit at lýsa við nøkrum brotum úr dagbókini. Petur Alberg skrivar m.a.:

*Týsmorgunin 15. januar 1924 um 5 tíðina var mitt fjórða barn borið í heim, ein deiligur 10 punds drongur, skýrdur lítli Petur, áðrenn hann var føddur eftur abba mínum Kjalnes Petur.*

*….*

*Sunnudagin 27. apríl var lítli Petur til dópin. Fadrar vóru Ada, Astrid, Jens á Lava, Johan, vanliga nevndur Jan, Restorff, Richard Long og Erling (sonur Kristin). Farið varð í kirkjuna eftir kirkjutið (kl 12½). Eg bar hann í kirkju, Jens á Lava út aftur. Døgurði kl. 2. Frálíkt í allar mátar. Kl 8 var boðið til nátturða. Har vóru faddrarnir, ljósmamma, Poul (helst beiggi Petur), Kristin og Nicolina, Wensil, Viggo, kona Johan Restorff og øll onnur sum avvardu. Seinni las Kristin upp, Richard spældi á grammofon. Hugnaligt og frálíkt í allar mátar. Lítli Petur er eisini ein frálíkur, vakur drongur, so hansara barsil átti ikki at verið verri enn hini fyrru.*

*….*

Tað skilst, at lítli Petur hevur verið ein eygnasteinur hjá pápanum, og annars hevur Petur Alberg verið eitt kensluborið familjumenniskja.

Hetta sæst skilliga á tí, hann skrivar 16. oktober 1926:

*Í Vági leygarkvøldið kl. 7½. Á, hevði eg sitið heima í Havn í kvøld! Nú haldi eg, at lítli Petur er farin í baljuna. Hann er altíð fyrstur. Eg síggi hann fyri mær, hvussu hann situr og tvassar, mín kæri lítli Petur, so kemur Djóni, og aftaná hann genturnar. Eg plagi altíð at støkka inn á gólvið niðri í Geil, og tá eg so komi niðan aftur, er lítli Petur sum oftast sovnaður. Men viðhvørt er hann ikki uppfarin, og so fer pápi upp við honum. Sum hann er klókur og chamerandi, neyðardýrið. Eygað er so klókt og poliskt. Eg siti her i kvøld og leingist eftir teimum øllum, lítla Peturi, Djóna mínum, Biritu og Annu, mínum stóru gentum og mínari kæru Jóhannu. Allur mín hugur er hjá heiminum, og eg telji tímarnar til týsdagin, tá vit skulu hittast aftur, um Gud vil, í øllum góðum. Gud vælsigni míni kæru elskaðu børn og mína kæru Jóhannu.*

## Verður deyðasjúkur

Í 1928 hendi tað mest ræðuliga, sum kann henda hjá øllum foreldrum. Fyrst í november liggja børnini við meslingum. Tann 8. november eru tey uppi aftur. Men knappliga verður lítli Petur sjúkur og fekk nógvan fepur. Læknin kom, men visti ikki hvat ið bagdi. Petur verður innlagdur á hospitalið og longu 11. november andast hann. Tað sæst á dagbókini, hvussu ómetaliga nógv tað stóð á Petur hesa tíðina, men hetta skal liggja.

## Jarðarferðin

Jarðarferðin var frá hospital-

sum 14 ára gamal frá jarðarferðini, sum var 17. november:

*Petur Alberg misti eisini eitt lítið barn, lítla Petur, knapt fimm ára gamal. Petur hevði so vakurt mál, - ein málmkend kenslurík baryton. Sum smádrongur hoyrdi eg hann syngja »Summarnáttin blíða er um grønar líðir løgst« og dró tað fram fyri eitt romantiskt dreingjasinni tær vakrastu myndir. Hann leikti hørpu, og síðan tá havi eg hugsað mær Dávid kong líkan Petur í Geil. Tá ið eg var hálvvaksin stóð eg í kirkjugarðinum á Svínaryggi. Tað var hesin lítli Petur, ið varð jarðaður, har sum abbi hansara Djóni, hvíldi. Eg visti, at Petur Alberg hendan dag jarðaði ein stóran part av hjarta sínum. Men at skilnaðarsóttin var so svár, sum eg seinni havi fingið at vita, visti eg ikki. Men, tað sum eg vildi siga í hesum sambandi var, at eg undraðist á, at Petur Alberg hevði styrki til sjálvur at syngja fyri á grøvini. Og tað var hesin ómetaligi vakri sangurin, sum leikbróður og ungmannafelagi hevði skrivað: » Sov nú barn í Harrans hond, sløkt er ljós á hesum sinni!« Tað eru stundir í lívinum, ið standa sum høgdar inn í sinnið. Hetta var ein.*

Sambært kladdu til sangirnar vóru eisinu sungnir sangirnir: »Lyksalig«, » Guds søn var selv et barn« og »Tín miskunn, o, Guð.«

Hetta neit sera fast hjá



*Kristin saman við konuni Nicolinu*

inum, og millum aðrar var Erling (hjá Kristin) ein ið bar. Nógvir kransar og blómur vóru sendar, og veðrið varð so vakurt ta løtuna. Tað hevði regnað so nógv, men tað kláraði upp, og var hetta ein troyst.

Her skal endutakast tað, sum Petur Háberg minnist



*Kristin í Geil, fremsti samfelagsrevsarin í hini øldini sum blaðstjóri á Tingakrossi*